LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 2. november 2017
J.Nr.: LUM-11- 17/00040-12
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Álit**

viðvíkjandi klagu um at Búnaðargrunnurin hevur sýtt umsøkjara partsinnlit

A hevur tann 21. mars 2017 sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Hendan klagan er um avgerð hjá Búnaðargrunninum um at nokta undirritaða innlit í eitt mál viðvíkjandi umsókn um veltistuðli.
>
> Búnaðargrunnurin noktar at lata innlit í skjøl, tí talan er um privatrættarligt mál, hetta hóast undirritaði er høvuðspartur í málinum."

Tann 3. apríl 2017 hevur A sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> "Undirritaði ringdi 30. november 2016 til Búnaðargrunnin fyri at spyrja, hvaðani krøvini, ið Búnaðargrunnurin í innanhýsis reglugerð hevur sett til fígging av rættum, stavaðu, og fekk svar, at tað var uppfunnið innanhýsis. Tá biðið varð um hetta skrivligt, varð tað noktað.
>
> Tí sendi undirritaði grunninum skrivliga umbøn um innlit í somu viðurskifti sama dag. Tann 15. desember 2016 minti eg grunnin á umbønina, fekk svar sama dag, har svarað var uppá ein part av innlitsumbønini. Beinanvegin varð svar sent grunninum, har víst varð á, at innlit bert var latið uppá ein part av umbønini, og at svarið var ógvuliga óítøkiligt.
>
> Svarað er framvegis ikki uppá spurningar mínar."

**Málsgongd**

Av tí at partshoyringin niðanfyri lýsir málsviðgerðina í málinum á nøktandi hátt, havi eg valt ikki at gera eina nærri lýsing av málsgongdini í hesum málinum.

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hesi málini nærri, og við skrivum, dagfest 3. og 5. apríl 2017, vórðu klagurnar sendar Búnaðargrunninum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Búnaðargrunnurin biðin um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málunum til láns.

Tann 18. mai 2017 sendi Búnaðargrunnurin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “... Búnaðargrunnurin hevur í nevnda máli sýtt klagaranum innlit grundað á, at talan er um privatrættarligt mál. Hetta byggir á, at grunnurin hevur viðgjørt eina møguliga fígging av ætlaða arbeiðinum, sum umsókn um stuðul er send viðvíkjandi. Tá talan er um fígging, virkar grunnurin á einum marknaði í kapping við aðrar fíggingarstovnar. Tað ber tí ikki grunninum til at lata innlit í slík mál.
>
> ...”

Tann 23. mai 2017 sendi umboðsmaðurin Búnaðargrunninum soljóðandi skriv:

> “Umboðsmaðurin hevur móttikið skjølini og viðmerkingar tykkara til klagurnar um handfaringina av áheitanum klagarans um innlit í málið um veltistuðul.
>
> Tað framgongur av klagunum og skjølunum hjá Búnaðargrunninum, at klagarin, sum hevur søkt Búnaðargrunnin um veltistuðul, eisini hevur biðið um innlit í málið, herundir innanhýsis reglurnar hjá Búnaðargrunninum fyri viðgerð av tílíkum málum. Í báðum førum hevur hann fingið noktandi svar.
>
> Grundgevingin hjá Búnaðargrunninum fyri at sýta innlit í málið var, at talan er um eitt *privatrættarligt mál*, og í sínum svari til umboðsmannin sigur grunnurin harumframt soleiðis: *“Hetta byggir á, at grunnurin hevur viðgjørt eina møguliga fígging av ætlaða arbeiðinum, sum umsókn um stuðul er send viðvíkjandi. Tá talan er um fígging, virkar grunnurin á einum marknaði í kapping við aðrar fíggingarstovnar. Tað ber tí ikki grunninum til at lata innlit í slík mál.”*
>
> Í skrivi til Búnaðargrunnin, dagfest 12. juni 2006, grundgav umboðsmaðurin fyri sínum sjónarmiði um, at Búnaðargrunnurin er at rokna sum partur av almennu fyrisitingini, og tann 7. juli 2006 boðaði stýrið fyri Búnaðargrunnin frá, at tað tók sjónarmið umboðsmansins til eftirtektar. Skrivini eru endurgivin í áliti umboðsmansins, dagfest 30. januar 2007. Avrit er viðlagt til tykkara kunnleika.
>
> Hetta merkir, at Búnaðargrunnurin er beinleiðis fevndur av fyrisitingarrættinum, herundir fyrisitingarlógini og innlitslógini.

> Hvat rætturin til innlit hjá klagaranum fevnir um valdast, um tað í ítøkiliga førinum snýr seg um eitt mál, har ein fyrisitingarlig avgerð er tikin, sum klagarin er partur í, ella um talan er um eitt mál um eina privatrættarliga gerð.
>
> Er talan um eina fyrisitingarliga avgerð, skal innlitsáheitanin viðgerast eftir fyrisitingarlógini. Er talan um eitt mál um eina privatrættarliga gerð, skal innlitsáheitanin viðgerast eftir innlitslógini.
>
> Um innlit í mál um privatrættarligar gerðir verður víst til álit umboðsmansins, dagfest 25. september 2008. Av áliti umboðsmansins, dagfest 24. oktober 2007, framgongur, at Búnaðargrunnurin áður hevur latið innlit í mál um fígging. Avrit eru viðløgd til tykkara kunnleika.
>
> Eftir míni fatan hevur lógin um Búnaðargrunnin sum fortreyt, at talan er um fyrisitingarligar avgerðir, jbr. m.a. § 11, stk. 5 har sagt verður, at avgerðir sambært lógini ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika.
>
> Innlitsáheitanin eigur tí í fyrsta umfari at verða viðgjørd eftir reglunum í fyrisitingarlógini um partsinnlit, og í tann mun innlitslógin veitir betri rættindi, eftir hesi seinnu. Eg fari í hesum sambandi somuleiðis at vísa Búnaðargrunninum á regluna í § 8, nr. 4 í innlitslógini, har tað er ásett, at rætturin til innlit fevnir um innanhýsis arbeiðsskjøl í endaligum líki, tá skjølini innihalda almenn stevnumið fyri viðgerðina av ávísum málsløgum.
>
> Áðrenn eg fari undir endaligu viðgerðina av hesum málinum, fari eg at biðja Búnaðargrunnin við eini freist áljóðandi 3 vikur um at gera síni sjónarmið um tey viðurskifti, sum hetta skriv umrøður, týðilig.”

Tann 4. juli 2017 vóru stjórin og ein málsviðgeri á Búnaðargrunninum á fundi við umboðsmannin. Til umrøðu varð eisini ein onnur klaga, sum klagarin hevði sent umboðsmanninum. Niðanfyri er endurgivið brot úr fundarfrágreiðingini, sum er viðkomandi fyri klagurnar um innlit:

> “... Búnaðargrunnurin hevði biðið um fundin, tí tey ikki vistu, hvussu grunnurin skal svara spurningunum frá umboðsmanninum í klagumálinum hjá A.
>
> Grunnurin metir, at klagarin hevur fingið innlit í alt tað tilfar, sum hann hevur rætt til. Umrøða varð av skjalinum, sum A ikki hevði fingið innlit í, og sum ikki lá á heimasíðuni. Talan er um eitt skjal, sum ein stýrislimir metti ikki var hóskaði sum ein reglugerð. Hetta innanhýsis skjal hevði onki við viðgerðina av umsóknini hjá A at gera, og var tað ongin forðing fyri, at hann kundi fáa innlit í hetta skjal. A vildi eisini hava innlit í tey atlit, sum lógu til grund fyri lánitreytum, sum settar verða, tá grunnurin veitir lán. Lánitreytir, kredittmetingar o.l. metir grunnurin ikki er umfatað av innliti, heldur ikki partsinnliti. Hetta er vanligt bankavirksemi, sum er av privatrættarligum slagi og tí ikki umfatað av fyrisitingarlógini ella innlitslógini. ...”

Tann 11. juli 2017 vendi umboðsmaðurin sær til Fiskimálaráðið, sum sambært lógini um Búnaðargrunnin hevur eftirlit við grunninum og sum varðar av lóggávuni um grunnin, til tess at spyrja, hvussu Fiskimálaráðið metti støðu Búnaðargrunsins vera í mun til almennu fyrisitingina. Greitt varð frá klagunum og teimum skrivum, sum eru endurgivin undir partshoyringini.

Tann 23. august 2017 sendi Fiskimálaráðið umboðsmanninum soljóðandi svar:

> "...
> Fiskimálaráðið hevur ta áskoðan, at Búnaðargrunnurin er partur av almennu fyrisitingini. Grunnurin er stovnaður sambært lóg, og í hesi lóg er einki sum bendir á, at grunnurin ikki skal roknast sum partur av almennu fyrisitingini. Harafturat er grunnurin fíggjaður við almennum peningi.
>
> Fiskimálaráðið metir tí, at grunnurin uttan iva er partur av almennu fyrisitingini og at avgerðir mótvegis borgarum, sum grunnurin tekur sambært lóggávu, sum grunnurin fyrisitur, eru fyrisitingarligar avgerðir. Grunnurin er beinleiðis fevndur av eitt nú fyrisitingarlógini, innlitslógini, meginreglum innan fyrisitingarrætt o.s.fr."

Tann 11. og 20. september 2017 spurdi umboðsmaðurin klagaran, um hann hevði móttikið fleiri skjøl ella upplýsingar frá Búnaðargrunninum í teimum málum, sum hann hevði klagað um. Av tí, at umboðsmaðurin einki hevur frætt aftur frá klagaranum, tekur viðgerðin av klagunum einans støði í grundgevingini hjá Búnaðargrunninum fyri partvís at sýta innlit.

**Niðurstøða**

Hendan klagan snýr seg um, at Búnaðargrunnurin hevur sýtt klagaranum partsinnlit í mál um fígging við teirri grundgeving, at tað snúði seg um eitt privatrættarligt mál (lánsfígging), og at Búnaðargrunnurin virkar í kapping við peningastovnarnar.

Í 2006 fekk umboðsmaðurin eina klagu um, at Búnaðargrunnurin kravdi persónliga kautión frá festarum fyri festilán. Tá heitti stýrið fyri Búnaðargrunnin á umboðsmannin um at taka støðu til, um Búnaðargrunnurin var partur av almennu fyrisitingini ella ikki. Um grunnurin ikki varð mettur sum partur av almennu fyrisitingini, hevði umboðsmaðurin ikki heimild at viðgera eina klagu um grunnin, jbr. § 4 í umboðsmanslógini.

Við skrivi, dagfest 12. juni 2006, sendi umboðsmaðurin stýrinum soljóðandi meting av spurninginum:

> "... Tá støða skal takast til hendan spurningin, verður samsvarandi løgfrøðiligu bókmentunum á økinum hugt at bygnaðarligu viðurskiftunum, tvs. í hvønn mun virksemið er lógarfest, og um viðkomandi "myndugleiki" er undir eftirliti frá tí almenna. Hetta er eisini gjørt í tykkara føri.

> Eins og tit vísa á í skrivinum, er Búnaðargrunnurin stovnaður við løgtingslóg, ið eisini ásetir virksemið hjá grunninum. Sambært § 11, stk. 1 í lógini verður grunnurin fyrisitin av einum stýri við 5 limum, harav landsstýrismaðurin velur 4. Sambært § 11, stk. 4 ger landsstýrismaðurin viðtøkur fyri grunnin, eins og hann sambært § 12 hevur eftirlit við grunninum. Í § 10 er ásett, at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur fyri lánsveiting, og hvørjar treytir lántakari skal lúka. Í § 11, stk. 5 er ásett, at avgerðir grunnsins ikki kunnu kærast til annan fyrisitingarmyndugleika.
>
> Vísandi til hetta eri eg ikki í iva um, at Búnaðargrunnurin er at meta sum hoyrandi til almennu fyrisitingina, sambært § 1 í fyrisitingarlógini, og at grunnurin harvið eisini er fevndur av virksemi umboðsmansins sambært § 4 í umboðsmanslógini. ..."

Tann 7. juli 2006 boðaði stýrið fyri Búnaðargrunnin umboðsmanninum frá, at tað hevði viðgjørt omanfyri nevndu meting og tikið niðurstøðuna um, at grunnurin var at meta sum ein partur av almennu fyrisitingini til eftirtektar (LUM 200600042).

Aftrat omanfyri nevndu meting kann leggjast, at endamálið hjá Búnaðargrunninum er at veita fígging til menning av føroyskum landbúnaði og at fíggja kostnaðin av at reka jarðarumsitingina. Høvuðsvirksemið er sostatt at veita lán ella stuðul, og málsviðgerðin av umsóknum í hesum sambandi er rættiliga neyvt regulerað í bæði lógini og kunngerðini um Búnaðargrunnin (løgtingslóg nr. 34 um Búnaðargrunn sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 80 frá 22. mai 2015 og kunngerð nr. 62 frá 7. mai 2013).

Tað er tí eingin ivi um, at láns- ella stuðulsveitingar úr Búnaðargrunnin eru ikki at meta sum mál, har grunnurin virkar á privatrættarligum grundarlag. Talan er um lógarreguleraðar fyrisitingarligar avgerðir. Fiskimálaráðið, sum hevur eftirlit við grunninum og varðar av lóggávuni, er av somu fatan, jbr. svar Fiskimálaráðsins til umboðsmannin, dagfest 23. august 2017.

Hóast stýrið fyri Búnaðargrunnin fyri meira enn tíggju árum síðani tók til eftirtektar, at Búnaðargrunnurin var partur av almennu fyrisitingini, bendir handfaringin av málunum hjá klagaranum á, at Búnaðargrunnurin tykist ikki at vera greiður um formligu støðu grunsins, og hvørjar reglur galda fyri virksemið hjá grunninum.

Eg fari at heita á Búnaðargrunnin um at taka uppaftur viðgerðina av innlitsáheitanum klagarans og í viðgerðini taka støði í, at A, sum er at meta sum partur í málinum, hevur biðið um innlit í mál, sum eru fevnd av fyrisitingarlógini, og viðgera innlitsáheitanirnar eftir reglunum um partsinnlit í fyrisitingarlógini. Í tann mun innlitslógin veitir A betri rættindi enn reglurnar um partsinnlit, eigur Búnaðargrunnurin eisini at viðgera málini eftir innlitslógini. Ítøkiliga verður serliga hugsað um regluna í § 8, nr. 4 í innlitslógini, sum ásetur, at rætturin til innlit fevnir um innanhýsis arbeiðsskjøl í endaligum líki, tá skjølini innihalda almenn stevnumið fyri viðgerðina av ávísum málsløgum.

Eg fari at biðja Búnaðargrunnin lata meg frætta, hvat víðari hendir í málinum.

Hendan niðurstøðan verður eisini send stýrinum fyri Búnaðargrunnin og landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, sum hevur eftirlit við Búnaðargrunninum og varðar av lóggávuni.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður